gult cyan magenta svart



FISKIVINNUTÍÐINDI

## Gólvuppboðssølan

**Góð 48 tons vórðu seld um uppboðssøluna hósdagin**

| Sýslu-nummar | Skipanavn | Reiðskapur | kilo |
|---|---|---|---|
| FD 176 | HELEN | LÍNA | 1.490 |
| FD 193 | MARNA | SNELLA | 1.455 |
| FD 329 | KARIN 3 | SNELLA | 457 |
| FD 420 | REYNIR | SNELLA | 903 |
| FD 460 | SAFIR | SNELLA | 162 |
| FD 530 | NORÐSØKI | LÍNA | 2.700 |
| FD 750 | BRIMNES | SNELLA | 124 |
| FD 783 | GLÚPUR | LÍNA | 1.690 |
| FD 954 | VØRÐAN | SNELLA | 176 |
| FD1137 | RIVTANGI | SNELLA | 817 |
| KG 170 | ELJAN | SNELLA | 167 |
| KG 189 | VÁTIKLETTUR | LÍNA | 2.350 |
| KG 279 | NORÐBERG | LÍNA | 4.697 |
| KG 323 | TURIÐ | LÍNA | 4.259 |
| KG 45 | RANDI | SNELLA | 264 |
| KG 47 | HAVSBRÚN | LÍNA | 3.153 |
| KG 642 | BRAGD | LÍNA | 1.195 |
| KG 661 | RÝPAN | SNELLA | 90 |
| KG 716 | KARIN | SNELLA | 2.036 |
| KG 832 | BORGIN | SNELLA | 109 |
| KG 92 | ØLDAN | SNELLA | 645 |
| TG 10 | EVI | SNELLA | 135 |
| TG 159 | VESTURBÚGVIN | SNELLA | 429 |
| TG 26 | MAJBRITT | SNELLA | 274 |
| TG 300 | LÍÐARBRØÐUR V/H. JOENSEN | SNELLA | 1.033 |
| TG 303 | RICHARD Í SMIÐJUNI | SNELLA | 40 |
| TG 304 | STEINTÓR | BOTNTROL | 808 |
| TG 349 | TRÝ DRANGUR | SNELLA | 87 |
| TG 360 | RANKIN | SNELLA | 165 |
| TG 422 | BEINTA | SNELLA | 112 |
| TG 471 | NÚPUR | SNELLA | 229 |
| TG 514 | KELDAFOSSUR | SNELLA | 592 |
| TG 576 | SVANUR | SNELLA | 245 |
| TG 622 | VARÐIN | SNELLA | 214 |
| TG 744 | MARJUN | SNELLA | 671 |
| TG 797 | NORÐFARIÐ | SNELLA | 103 |
| TG 808 | POUL S. | SNELLA | 94 |
| TG 95 | FLØTUNES | SNELLA | 124 |
| TN 483 | ÆGIR | LÍNA | 2.854 |
| TN 753 | TÓRA | LÍNA | 1.361 |
| TN 832 | HVÍTANES | SNELLA | 103 |
| TN 973 | ANNA KATRINA M/B | SNELLA | 533 |
| TN 992 | ÁRNASTEINUR | LÍNA | 1.154 |
| TN1090 | ANNIKA | LÍNA | 1.200 |
| VA 109 | ELLA | SNELLA | 189 |
| VA 125 | LÍRABERG | SNELLA | 155 |
| VA 141 | ÁLKUKLETTUR M/B | SNELLA | 242 |
| VA 202 | JENNY D | SNELLA | 102 |
| VA 213 | LEITISTANGI | SNELLA | 305 |
| VA 221 | CARINA | SNELLA | 64 |
| VA 251 | ELVIRA M/B | SNELLA | 98 |
| VA 28 | ÁLITIÐ | SNELLA | 211 |
| VA 294 | NESTANGI | SNELLA | 210 |
| VA 324 | SKARVUR | SNELLA | 222 |
| VA 34 | DUNGA HANS M/B | SNELLA | 271 |
| VA 60 | DÁVA DÁNJAL | SNELLA | 259 |
| VA 717 | STÍGANES | SNELLA | 174 |
| VA 81 | GUTTA JÓGVAN | SNELLA | 1.099 |
| VA 82 | RAÐNES | SNELLA | 78 |
| VN 132 | TORDIS M/B | SNELLA | 54 |
| VN 136 | SÆVAR | SNELLA | 639 |
| VN 25 | TOFTAFOSSUR | SNELLA | 59 |
| VN 301 | NÓSIN | SNELLA | 37 |
| VN 350 | TERJÁ | SNELLA | 159 |
| VN 405 | KRABBIN | SNELLA | 562 |
| VN 408 | JÓNVØR | SNELLA | 468 |
| VN 447 | FRÍÐGERÐ | SNELLA | 472 |
| VN 46 | VESTURROÐIN | SNELLA | 401 |
| VN 496 | REYNI | SNELLA | 149 |

| VøruNavn | kg | VøruNavn | kg |
|---|---|---|---|
| BROSMA 0 | 95 | REYÐSPRØKA 0 | 99 |
| BROSMA 3&4 | 32 | SIL | 644 |
| HÝSA 1 | 334 | SKRUBBA | 60 |
| HÝSA 2 | 1.496 | STEINBÍTUR | 104 |
| HÝSA 3 | 3.376 | TOSKAROGN | 1.917 |
| HÝSA 4 | 140 | TOSKUR 1 | 329 |
| HAVTASKA 0 | 6 | TOSKUR 2 | 3.648 |
| HÁVUR | 3 | TOSKUR 3 | 16.671 |
| HVASSKVOYSA | 9 | TOSKUR 4 | 14.412 |
| HVÍTINGUR 0 | 4 | TOSKUR 5 | 3.793 |
| KALVI 4 | 3 | TUNGA 0 | 707 |
| LIVUR | 49 | UPSI 0 | 43 |
| LONGA 0 | 42 | UPSI 2 | 31 |
| LONGA 4&5 | 49 | UPSI 4 | 82 |

# Rækjuruta úr Kanada

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*



*Skipafelagið Føroyar hevur chartrað »Green Berger« at røkja siglingina millum Kanada, Føroyar og Danmark*

1. apríl fer Skipafelagið aftur undir at sigla millum Kanada, Føroyar og Danmark við nýggjum størri skipi. Skipafelagið Føroyar hevur í fleiri ár siglt hesa rutuna, sum fyri og fremst er ætlað til at flyta rækjur úr New Foundlandi til Føroyar og Danmark.

Skipafelag Føroyar hevur nú chartrað eitt munandi størri og skjótari skip til hesa rutu. Tað er frystiskipið “Green Bergen”, sum er eitt gott og nútímans skip. Skipið er 130 metur langt, tekur 164 TEU og lastar umelið 4000 tons. Skipið gongur 17 míl og kann eisini lasta 25 persónbilar.

Skipið skal sigla í fastari rutu millum Hirtshals, Føroyar og Robert Bay ella Harbour Grace í New Foundlandi. Hvør rundtúrur tekur 18 dagar og ferðin úr New Foundlandi til Hirtshals verður seks dagar og fimm dagar millum New Foundland og Føroyar.

Nógvur laksur hevur verið fermdur hendan vegin seinastu árini og Skipafelagið vónar, at føroyingar aftur fara at nýta hesa rutuna til laksaútflutning. Eisini er møguleiki at flyta annan fisk og stykkjagóðs á hesi rutuni.

Skipið hevur stabilisatorar sum gera at vøran verður betri varðveitt, tí skipið rullar mini. “Green Berger” hevur tvey síðuportur og elevator, sum kann tryggna skjóta lasting og lossing.

# Loyvi sum virðisbrævameklarafelag

Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F hevur nú fingið loyvi frá danska fíggjareftirlitinum at reka virksemi sum virðisbrævameklarafelag. Lóg um virðisbrævameklarafeløg kom í gildi í Føroyum tann 28. februar 2001, og sama dag fekk Kaupthing Føroyar, sum fyrsta felag í Føroyum, loyvi frá Fíggjareftirlitinum. Loyvið var fingið júst eitt ár eftir at Kaupthing fór undir virksemi í Føroyum.

Nýggja loyvið merkir, at framyvir fer alt virksemi hjá Kaupthing í Føroyum at ganga fyri seg í Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F, sum er eitt føroyskt felag. Tað eru Føroya Sparikassi og Kaupthing hf. sum eiga Kaupthing Føroyar Virðisbrævameklarafelag P/F.

# Netkjak millum Høgna Hoydal og hyggjarar

**Í sambandi við at DR2 sendingin »Temalørdag« í dag fer at snúgva seg um Føroyar og føroysku fullveldisgongdina, bjóðar danska sjónvarpsstøðin hyggjarum sínum at seta Høgna Hoydal, varaløgmanni, spurningar viðvíkjandi fullveldisætlanini**

TEMALØRDAG
*Rúnar Reistrup*

Undir yvirskriftini »Hvorfor vil i rive jer løs« ber í løtuni vanliga dananum til at spyrja Høgna Hoydal, varaløgmann, spurningar um fullveldisætlan landsstýrisins. Hetta fer fram á vevsíðuni hjá DR2 sum eitt slag av upptakt til sendingina »Temalørdag«, sum í dag fer at snúgva seg um Føroyar. Sendingin verður eisini send í Sjónvarpi Føroya. Ætlanin er, at kjakið millum Høgna Hoydal og hyggjararnar partvís skal vera grundarlag undir teimum tveimum samrøðunum, sum verturin, Frank Esmann, í sendingini hevur við ávikavist Anfinn Kallsberg, løgmann, og Poul Nyrup Rasmussen, forsætisráðharra. Hyggjararnir hava havt møguleika at sett spurningar tað mesta av hesi vikuni. Komandi dagarnar verða svarini hjá Høgna Hoydal kunngjørd á vevsíðuni.

### Støðan broytt so hvørt

Tað eru teir báðir Frank Esmann, ið er fastur vertur á »Temalørdag«, og føroyski produsarin Herluf Sørensen, sum hava lagt tríggjar tímar longu sendingina til rættis.

Tá farið varð undir at arbeiða við sendingini í summar, lá tað í luftini, at ein fólkaatkvøða um fullveldi stóð fyri framman. Men hóast støðan er nógv broytt síðan tá, hevur sendingin ikki mist sín aktualitet, tí hon snýr seg meira um føroysku fyritreytirnar fyri loysing og fullveldi enn um sjálva ta ætlaðu fólkaatkvøðuna.

Sendingin hyggur millum annað at, hvussu vónirnar um at finna olju í føroysku undirgrundini ávirka loysingarhugin hjá føroyingum, og meðan sjálv fólkaatkvøðan um fullveldi er blivin minni aktuel nú, so hevur føroyska undirgrundin verið eitt av høvuðsevnunum í donsku fjølmiðlunum farnu tvær vikurnar og er tískil eitt glóðheitt evni beint nú.

### Skráin

Skráin fyri tríggjar tímar langu »Temalørdag« sendingina byrjar við filminum »Tre blink mod vest« hjá Ullu Boje Rasmussen. Síðan kemur ein 50 minuttir lang dokumentarsending um Føroyar í dag, og um hvørjar møguleikar landið hevur at gerast sjálvbjargið. Hendan byrjar við at sjónvarpsverturin er staddur á einum av boripallunum í Hetlandsrennuni, fáar fjórðingar frá føroyska økinum, har olufeløg í summar fara at gera royndarboringar eftir olju. Oljan verður gjøgnumgangandi tráðurin hesar 50 minuttirnar.

Síðan hevur Frank Esmann samrøðu í sjónvarpsstovuni við Anfinn Kallsberg, løgmann, áðrenn kósin aftur verður sett til Føroya, har Páll Patursson, kongsbóndi, fer at greiða frá søguliga loysingarstríðnum.

»Temalørdag« endar við at Frank Esmann hevur danska forsætisráðharran í sjónvarpsstovuni og eitt seinasta legg verður gjørt til Føroyar, har tykissamfelagið Svínoy við sínum skjóta internetsambandi út í cyberspace, er evni.

»Temalørdag« verður send í Sjónvarpi Føroya klokkan 19.00, samstundis sum sendingin fer í luftina í Danmark.

Á vevadressuni www.dr.dk/dr2/tema ber til at seta Høgna Hoydal, varaløgmanni, spurningar.



VIÐMERKINGAR

# Starvsmannafelagið

**stovnað mitt í fakligum stríði stendur at lesa í Dimmalætting leygardagin 24. februar í ár, og at stovningardagurin er 23. februar.**

**Óluva Húsgarð**
*Í Havn, 26. febr. 2001*

Havi onki skrivligt tilfar at halda meg til viðvíkjandi stovningardegnum, men av tí at eg eri tann einasti, ið livi eftir av okkum, bæði í Starvsmannafelagnum í Føroya Landsstýri, sum skrivaðu undir »Sáttmála millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið viðvíkjandi treytum fyri at seta í starv skrivstovufólk og -lærlingar« dagfestur hin 27. oktober 1961, kenni eg tað sum mína skyldu at geva hesa frágreiðing.

Fyri Føroya Landsstýri skrivaðu P. M. Dam, K. Djurhuus, N. Winther Poulsen og J. Djurhuus var meðundirskrivari.

Fyri Starvsmannafelagið skrivaðu E. Djurhuus, Niclas Andreassen, Esta í Funningsstovu, Óluva Húsgarð og Viggo Planck, undir.

Í § 18 stendur, at sáttmálin hevur gildi frá 1. apríl 1960 at rokna, tó soleiðis, at gjald fyri yvirtíðararbeiði verður roknað frá 1. apríl 1961, og kann verða uppsagdur av báðum pørtum við 3 mánaða fyrivarningi, tó í fyrsta lagi 1. apríl 1962.

Er Starvsmannafelagið stovnað 23. februar 1961, so er Meginfelag Starvs- og Tænastumanna eisini stovnað henda dag. Í Føroyum vóru tá bert 40 tænastumenn innan landsumsitingina.

Tænastumenn landsins, ið settir eru við løgtingslóg, koyrdu okkum starvsfólk út í verkfall allan august mánað 1960. Starvsfólk landsins vóru tá lønt eftir »Statens regulativ for kontorfunktionærer«.

Orsøkin til, at tænastumenn landsins fóru í verkfall og drógu okkum starvsfólk við sær, var, at Føroya Løgting hevði biðið danska fólkatingið rinda 55% av útreiðslunum til læraralønir, ístaðin fyri 50%, so at lærararnir í Føroyum fingu somu løn sum danskri fólkaskúlalærarar.

Sí kopi!

Tænastumenn landsins kravdu líka stóra lønarhækking, og tá ið hetta ikki varð játtað, fóru teir í verkfall.

Allar almennar skrivstovur stóðu stongdar allan august mánað í 1960.

Hin 15. august 1960 skrivaði Føroya Landsstýri soljóðandi bræv til hvønn einstakan starvsmann undirskrivað av P. M. Dam:

»Landsstýrið hevur ..... ........ hósdagin 18. august 1960.«

Teir, sum stóðu fyri verkfallinum, høvdu skrivstovu á Hotel Hafnia, har starvsfólk kundu venda sær at frætta tíðindi. Tá ið eg hevði fingið frammanfyristandandi skriv frá landsstýrinum, fór eg á Hotel Hafnia at spyrja, um eg skuldi fara til arbeiðis hósdagin hin 18. august. Svarið var: ÓMØGULIGA!

Verkfallið endaði við, at semja varð um at hækka allar grundlønir við 10% og at seta niður nevnd at gera uppskot til løgtingslóg um tænastumenn landsins. Henda løgtingslóg varð samtykt á vári 1961 og varð kunngjørt gjøgnum nógvar Dimmalættingar í mai 1961. Henda stóra tænastumannalóg varð skrivað í 8 eintøkum við »carbonpappíri« millum hvørt eintakið. Varð bókstavur sligin skeivt, skuldi tað ikki síggjast, at har var rættað. So strong vóru krøvini tá!

Fyrsta lógin hjá Starvsmannafelagnum er samtykt á fundi hin 6. mars 1961. Í § 12 í hesari lóg stendur, hvussu Meginfelag Starvs- og Tænastumannafelag skal bera seg at í øllum felagsmálum. Um hetta felag er til enn, er ókunnugt fyri m.

Sama dag – 27. oktober 1961 – sum sáttmálin millum Føroya Landsstýri og Starvsmannafelagið er undirskrivaður, er kunngerð nr. 66 viðv. arbeiðstíðini á skrivstovu landsins undirskrivað. Kunngerðin er soljóðandi:

»Eftir § 8 í sáttmála, 27. oktober 1961, millum landsstýrið og starvsmannafelagið eru tær lønir, ið har eru fyrisettar, roknaðar fyri fulla dagliga arbeiðstíð, sum er 42 tímar um vikuna.

Sostatt verður við hesum fyrisett, at arbeiðstíðin fyri skrivstovufólk og -lærlingar frá 1. november 1961 er frá kl. 9–16.30, leygardag tó frá kl. 9–13.30, og er henda skrivstovutíðin í einum.-« Undirskrivað P. M. Dam løgmaður og meðundirskrivari J. Djurhuus.

Hetta vóru krøvini – 7 1/2 tíma um dagin á einari almennari skrivstovu, undir hørðum arbeiðstrýsti – skrivstovu sum ikki hevði fingið góðkenning frá Arbeiðseftirlitinum, um tað hevði verið til tá, VIÐ ONGARI MATSTOVU!!

Vit 4 – Niclas Andreassen, Esta í Funningsstovu, Viggo Planck og eg, høvdu øll verið í Danmark og fingið okkum fakliga útbúgving – Niclas Andreassen komin upp undir land við hægri lesnaði, men noyddist at gevast av peninganeyð. Vit vistu, eftir hvørjum reglum fakliga útbúgvin fólk starvaðust. Hesin fyrsti sáttmálin hjá S t a r v s m a n n a f e l a g n u m hevði 4 lønarflokkar og reglur vóru fyri framflutningi. Limagjaldið var 120 kr. um árið og 30 kr. um árið fyri lærlingar. Ongin av okkum misti lønina fyri august mánað og komst hetta allarhelst av, at tænastumenn eisini vóru í verkfalli.



FØROYA LANDSSTÝRI

Tórshavn tann 15. august 1960

Landsstýrið hevur í dag sent Starvsmannafelagnum fylgjandi skriv:

[illegible]

Henda nevnd er í arbeiði.

[illegible]

Hetta verður gjørt tygum kunnugt [illegible] 19. august 1960

FØROYA LANDSSTÝRI

L. v.

P. M. Dam.

Frk. Óluvá Húsgarð, skrivstovukvinna, her.

Longu í 1971 fingu tænastumenn landsins nýggja tænastumannalóg. Atli P. Dam var tá løgmaður, og h e i m a s t ý r i s f l o k k u r i n mannaðu eisini tá Føroya Landsstýri.

Tá ið lgøtingið var slitið á vári 1971, hevði tað hækkað lønirnar hjá løgtingsmonnum, landsstýrismonnum og tænastumonnum, men setti starvsfólkini eftir. Starvsmannafelagið boðaði frá verkfalli, og allar almennar skrivstovur stóðu stongdar í august 1971. Men nú fingu starvsfólkini ikki løn, meðan tey vóru í verkfalli. Tey, sum vóru ringast fyri, kundu venda sær til Starvsmannafelagið og fáa peningaliga hjálp. Eftir at hava sitið í almennum starvi í 20 ár og í 11 ár við ongum framflutningi, fekk eg hetta árið bert 11 mánaðarlønir.

Men nú kom stóra fíggjarliga skrædlið í almennum lønarútreiðslum. Starvsmannafelagið, ið hevði havt 4 lønarflokkar, fekk nú sáttmála við Føroya Landsstýri um 40 lønarflokkar. Men ikki vóru tað tey, um høvdu longsta starvsaldurin, ið vóru lyft upp í hægri lønarflokk eins og siðvenja er innan almenna umsiting í øllum okkara grannalondum. Fólk vórðu tilvildarliga sett í teir ymisku lønarflokkarnar – hvørki eftir fakligari útbúgving ella starvsárum – men eftir hvussu tey stóðu í eygunum á stovnsleiðarum, sum ikki høvdu sæð eitt alment skrivaraborð, fyrr enn teir vórðu settir sum skrivstovustjórar.

Starvsfólk innan føroyska umsiting vórðu ikki tvingað at vera limir í Starvsmannafelagnum, fyrr enn eftir verkfallið í 1971. Starvsmannafelagið var so framligt, at tað gjørdi avtalu við Føroya gjaldstovu um at taka fyri limagjaldið, áðrenn lønin var útgoldin. Tað eg veit, vóru vit bert 3 limir, sum nokaðu felagnum at fara inn á lønarkontoina.

Nú Starvsmannafelagið hevur 1700 limir, er tað blivið ein maktfaktorur í Føroyum, og tað var ikki hetta, felagið varð stovnað til. Men hetta er prógv um, hvussu tað almenna í Føroyum hevur broytt seg út á alt samfelagið.

# Fólksins vilji

**Eilif Samuelsen**
*26-02-01*



Nú hava partar av hesi samgonguni at enda viðurkent, at tann politikkurin, teir hava ført hesi seinastu trý árini, ikki hevur verið í samsvari við fólksins vilja.

Øll minnast teirra glæsiligu proklamatiónir um eina skipaða ætlan í fýra stigum, sum skuldi hava fullveldi sum mál, og alt hetta skuldi fremjast eftir einum stuttum tíðarbili. Eftir bestu management-prinsippum hava teir verið púra datofikseraðir. Men tað livandi lívið vil sum kunnugt ikki altíð laga seg eftir managementkalendaranum hjá juppy-liðinum. Og Fólkaflokkurin skal hava tað rós, at hann bjargaði bæði Tjóðveldisslóðaranum og øllum fylgi hansara frá at fara ’á ta glerstoyttu skor’ og sostatt fara ’í smildur og sor’. Tá ið teir eru komnir niður á jørðina og hava fingið fast undir fótin aftur, so kunnu teir ivaleyst halda fram sum ein virðismikil liður í strembanini eftir at menna føroyska samfelagið fram ímóti størri sjálvbjargni, væl at merkja eftir gongdum leiðum.

Í tí nevndu ætlanini í fýra stigum segði tann nýgjørda samgongan: ”Fyrsti partur av hesum stigi varð tikin 30. apríl 1998. Tá gav Føroya fólk teimum flokkum meirluta, sum hava føroyskt sjálvræði sum politiska stevnu. Seinni var so eitt samgonguskjal undirskrivað, har tríggir flokkar bundu seg til at fremja fólksins vilja á hesum øki.”

Tað hevði verið ólíka betri fyri landið og hevði spart okkum fyri hetta trý ára interregnum, sum vit í roynd og veru hava verið ígjøgnum, um teir tríggir flokkarnir í síni meting og niðurstøðu av valinum eisini høvdu tikið við ta søguligu dimensiónina. Hon hevði sagt teimum, at hóast almikið hevði kunnað havt verið øðrvísi í viðurskiftunum millum Danmark og Føroyar upp gjøgnum tíðirnar, so eru bondini og lagnufelagsskapurin, sum hevur bundið okkum saman, so sterk og so fjøltáttað, at tey ikki kunnu verða kvett og slitin við brestin. Søgan hevði eisini kunnað sagt, at í einum so stórum máli sum at slíta 600 ára samband millum tvey lond, er ikki nóg mikið, at 51 av hvørjum hundrað atkvøða fyri. Tá er ein helvt, sum er ímóti, og í hesum føri er valla rætt at skjóta seg undir, at talan er um demokratiska avgerð. Tá ið 98 % av fólkinum heldur tað vera rætt at fáa loysing, soleiðis sum tað var í Íslandi á sinni, tá hugsi eg, at sambandsfólk høvdu latið sær lynda og høvdu gingið undir úrslitið sum eina demokratiskt rættvísa

*Framhald á síðu 12*